# Føroyahúsið í Keypmannahavn í summarfrí

FØROYINGAR Í KEYPMANNAHAVN
*Føroyingahúsið*

Eins og árini frammanundan er kaffistovan í Føroyahúsinum stongd í tríggjar vikur, meðan summarfrí er. Um summarið er vanliga friðarligt og neyðugt at seta húsið ístand til ein langan vetur við mongum tiltøkum.

Kaffistovan lat aftur fríggjadagin 29. juni og letur uppaftur 23. juli – ólavsøkuvikuna. Ólasøkuaftan og ólavsøkudag er opið báðar dagarnar. Tað er vorðið siðvenja at skipa fyri eini mini-ólavsøku niðri, so føroyingar á ferð og tey, sum her búgva, kunna detta inn á gólvið eina løtu og hugna sær saman við landsmonnum. Á skránni er altíð okkurt, sum er av áhuga. Hesu ferð verður fernisering ólavsøkuaftan. Arngerð Joensen úr Hoyvík hevur framsýning. Føroyski borgarstjórin í Jylling/Gundsø Kommunu heldur ólavsøkurøðuna, bólkurin FUSE hugnar um við tónleiki og spælir til dansin. Torben Jóhannesen prestur, fyrrv. háskúlastjórin, prædikar ólavsøkudag í Eliaskirkjuni. Hendan dagin er kafékvøld í húsinum við felagssangi, røðu og tónleiki. Eisini er matsøla. Umframt smurt breyð við føroyskum viðskera, verður sjálvtøkuborð báðar dagarnar og leskiligar køkur, sum kokkurin Stina Gudmundsdóttir tekur sær av. Ólavsøkudagarnar plagar at vera væl vitjað og gott lag á fólki. Skráin verður lýst seinni bæði í føroysku bløðunum og á heimasíðuni hjá húsinum.




*Eins og árini frammanundan er kaffistovan í Føroyahúsinum stongd í tríggjar vikur, meðan summarfrí er. Um summarið er vanliga friðarligt og neyðugt at seta húsið ístand til ein langan vetur við mongum tiltøkum*

### Kaffistovan miðdepilin í Føroyahúsinum

Føroyahúsið er um 730 fermetrar til samans, men er í tveimum hæddum. Á 1. hædd er stór stova til feløgini, skúla og kirkjubrúk ella útleigu av ymsum slag. Har uppi er eisini Nærvarp Okkara, Ráðgevingin og MFS-skrivstova og sjálvandi toilett og køkur umframt eitt hugnaligt høli til smáfundir o. a. og stór gongd/torg.

Kaffistovan er á stovuhæddini. Hon er í størra lagi dagliga, men stundum ov lítil til tey mongu vetrartiltøkini. Serstakliga kann vera trongligt dansikvøldini. Borðreiðast kann til um hálvtannaðhundrað fólk. Til dans kunna vera stívliga tvey hundrað fólk inni og meira, um báðar hæddirnar eru í brúki.

Í kaffistovuni er eisini føroyskt bókasavn, smásøla av fløgum, bókum og klædnavørum. Opið er hvønn gerandisdag seinnapartin. Tá er altíð okkurt til ábit og føroysku bløðini frammi. Kaffistovan rúmar øllum í senn og skal kunna broytast frá einum tiltaki til tað næsta stundum dag um dag, tá ið rættilig gongd er á frá septembur til mei.

Bæði føroyingar og danir biðja um tilboð til privata veitslur í kaffistovuni ella í øllum húsinum. Roynt verður at taka sær av øllum frá barnadópi, konfirmatión, brúdleypið og rundum føðingardøgum og til ervi. Hetta kann vera fitt ískoyti til raksturin og kaffistovan er stak væl egna til slíkt.

Síðani býendurnýggingin bleiv liðug fyri einum ári síðani er vorðið nógv snøggari uttanum og bygningurin málaður. Hetta ger sítt til at nú er hugaligari at hava privat tiltøk í húsium. Tey bæði árini arbeiðið fór fram, var mangan sera ótespiligt uttanum. Tó skal skoytast uppí, at Føroyahúsið fekk partvíst endurgjald fyri húsaleigu ta tíðina. Í Keypmannahavn hava teir roynt at umvælt gamlar býarpartar. Úrslitð er mangan rein undirverk. Hálvvegna avtoftaðir bygningar og garðarar eru ikki til at kenna aftur, tá ið arbeiðið er liðugt.

### Húsið og feløgini skipa fyri

Tey mongu tiltøkini koma ikki av sær sjálvum. Húsið feløgini skipa hvør sær ella saman fyri tí mesta. Stundum býður onkur einstaklingur sær til. Feløgini hava vanliga dansikvøldini. Kvinnufelagið, MFS og Føroyingafelagið skipa fyri fyrilestrum, kafékvøldum og tiltøkum av ymsum slag. Á hendan hátt ber til at fáa fjølbroytt tilboð. Tað er tí av alstórum týdningi at feløgini eru við til at mynda húsið. Í vár vóru Jóannes Eidesgaard og Óli Breckmann á hvør sínum fundi. Ein pallborðsfundur var um oljuna og Føroyar á vegamóti. Nógv tiltøk í heyst eru longu sett í kalendaran. M. a. hevur Kvinnufelagið fleiri spennandi fyrilestrar. Nú Heðin Brú verður 100 ár fara Føroyahúsið og Føroyingafelagið at skipa fyri einum tiltaki í heyst. Eisini er vínveitsla, lundaveitsla, bókadagur, bingo, týsdagsdøgverðar og mangt annað á skránni.

### Føroyahúsið kann ikki vera sjálvboðin fyriuttan

Altíð er onkur sum av sínum eintingum tekur eina hond í. Kortini kann tað henda, at summi standa eftir við ov nógvum, meðan ov fá eru til annað. Tí fegnast vit um ein og hvønn, sum sær tørvin og rættir eina hond. Tað ger samlagið í húsinum nógv betri. Satt at siga kann húsið ikki vera hesi fólk fyriuttan.

Fíggjarliga er sum hjá flestu slíkum stovnum trongligt. Húsið fær árligan stuðul til raksturin úr Føroyum. Hesin er nú um 1,3 millj kr. Raksturin liggur tó nakað hægri. Tí skal ein hálv milljón skaffast annan veg. Tað kann vera tógvið stríð. Sjálvbodna arbeiðsmegin bæði sparir húsinum nakrar krónur, men er sanniliga eisini ein góður stuðul til tað fasta fámenta fólki.

### Samstarv um stórtiltak

Vit trý h´sini úr Útnorði: Grønlendska Húsið, Íslendska Húsið og Føroyahúsið, hava havt fleiri fundir um eitt tiltak í mei komandi ár, sum vit kalla ”Nordatlantisk Kulturfestival” í Keypmannahavn 2002. Nógv hugskot eru á lofti og longu nú er eitt á feløg, ymsi søvn og stovnar um at vera við hvør á sín hátt: Nationalmuseet, Geologisk Museum, Statens Museum for kunst, Ridebanen, føroyskan bátasmið, grønlendskan kajakksmið, kór, sjónleikarabólkar og onnur. Ætlanin er at hava meginpartin í Huset i Magsstræde og har um vegir. Men eisini verður ymist í teimum trimum húsunum. Nú verður ein faldari gjørdur, sum boðar frá tiltakinum. Eisini verður ein heima síða, har meira fæst at vita. Navn hennara verður www.nordatlant.dk.

Føroyahúsið hevur sína egnu heimasíðu, har ein og hvør kann leita sær upplýsingar um húsið, feløgini og tiltøk í húsinum. Eisini eru links til leitiamboð, onnur feløg og stovnar. Hon eitur www.faroehouse.dk.

Føroyahúsið ynskir landsmonnum, samstarvsfólki og útisetum gott summar.

---

†

Okkara kæri sonur

**Elias Niclasen**

sovnaði frá okkum 25. juni 2001.

Jarðarferðin verður frá Båtsfjord kirkju
týsdagin tann 3. juli kl. 11.00.

Sov søtt lítli skattur

**Norman, Kathrine og Andreas**

***Et Barn For Lite***

***Kjære Elias***

*Du er sangen som ingen fikk synge*
*Du er husken som ingen fikk gynge*
*Du er ordene som aldri ble sagt*
*Du er drømmene som ble ødelagt*
*Du er diktet som aldri ble skrevet*
*Du er livet som aldri ble levet.*

*Men vi gjemmer deg i hjertet inne*
*Som et vakert lite minne.*

---



# Størsta grindin í fleiri ár



*Størsta grindin í fleiri ár legði sunnudagin beinini á Sandi. Øll á Sandoynni fáa sín part av grindini*
*Mynd: Jonhard Hammer*

**Sunnudagin doyði ein stór grind á Sandi. 170 hval løgdu beinini á sandinum, og drápið gekk ómetaliga væl**

GRINDADRÁP
*Stefan í Skorini*

Sunnumorgunin vórðu sandingar purraðir út tíðliga á morgni, tí ein grind varð funnin við eystanfyri við Søltuvík. Tað var trolarin Eysturbúgvin, ið bar eyga við grindina og boðaði frá.

170 hval løgdu beinini, sum tilsamans góvu 1600 skinn. Býtt varð soleiðis, at hvør íbúgvi á oynni umframt tey vitjandi fingu 3/4 skinn. Bátsparturin var trý skinn. Sandoyingar, sum ikki luttóku í drápinum, fingu sostatt eisini sín part.

Ingibjørn Eldevig er sýslumaður í Sandoynni, og hann greiðir frá, at vanligt er ikki at hava drápspartar. Tey vitjandi vóru eini 200-300 í tali, so ein stórur partur av grindini fór av oynni.

### Stór grind

Seinastu tíggju árini hava sandoyingar ongantíð sæð so stóra grind. Ingibjørn sigur, at hann hevur kannað hagtølini, og tann størsta grindin seinastu tíggju árini var 80 hval, og hendan er meira enn tvær ferðir so stór.

Nú sandoyingar hava fylt lakatunnurnar aftur er nóg mikið til næsta árið. Í fjør doyði bara ein lítil grind í oynni, og tí kom henda grindin væl við.

Sýslumaðurin sigur, at drápið tók umleið 25 minuttir, og alt gekk ómetaliga væl. Allur bólkurin gjørdi landgongd, og tí stóð á at drepa. Bara eini 20-30 mans vóru komnir oman á sandin, tá hon gjørdi landgongd, men so tusti fólk til.

Neyðugt var at vekja fólk við mikrofon í bygdini, tí tað var so tíðliga á morgni, at fá vóru á fótum. Boðað varð frá grindini klokkan seks, men klokkan átta var grindin deyð.

Nógv nebbasild var í grindini, og tað boðar frá góðum. Menn á Eysturbúgvanum siga, at nógv grind var at síggja eystanfyri, og at hetta bara var ein lítil partur.

Springarar vóru eisini við í bólkinum, men teir hildu leiðina eystur í hav.



*Likkurnar fáa eisini sítt, tá ein grind er dripin*
*Mynd: Jonhard Hammer*

# Springarar norðanfyri

SPRINGARAR
*Stefan í Skorini*

Fríggjadagin seinnapart varð ein bólkur av springarum rikin inn á Hvannasund norðanifrá. Bólkurin varð sæddur við lendingina á Viðareiði. Hetta var umleið klokkan hálvgum fýra. Tað eydnaðist tó ikki at drepa henda bólkin av springarum, hóast menn gjørdu eina roynd.

Torført var at fáa springararnar upp á land, og tí róku menn springararnar útaftur nakrar fáar tímar seinni. Talan hevur verið um einar 100 til 150 springarar.

Leygardagin doyðu átta springarar í Klaksvík. Teir vórðu býttir millum tey luttakandi, og av tí at talið av springarum var so lítið, kom sýslumaðurin ikki upp í leikin.

---

## Fekk skaða á stolnari motorsúkklu

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Fríggjanáttina var eitt ferðsluóhapp í Sandavági, tá ein 18 ára gamal drongur rendi í ein garð í bygdini á eini motorsúkklu ella motorcross, sum tær eisini verða nevndar. Drongurin hevði fyrst stolið súkkuna í Miðvági og var síðani farin til stroks við henni.

Hann hevur havt ov nógva ferð, tá hann er komin til Sandavágs. Tjóvurin missir tamarhaldið á súkkluni og endar í garðinum. Drongurin fekk skaða og mátti flytast á landssjúkrahúsið. Hann hevur brotið beinið og fingið aðrar snuddir.

Orsøkin til óhappið var ov nógv ferð, upplýsir løgreglan í Vágunum. Hetta serliga slagið av motorsúkklum er ikki ætlað til vanliga vegkoyring á asfalti, og tí liggja hesar súkklurnar ikki væl á vegnum.

Drongurin verður væntandi ákærdur fyri stuldur.

## Ferðsluóhapp í Skálabotni

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Førarin slapp ómetaliga væl frá einum ferðsluóhappið í Skálabotni sunnumorgunin, sum kundi enda verri.

Ein maður einsamallur í bilinum koyrir ígjøgnum bygdina umleið klokkan hálvgum níggju. Tá hann kemur til støðna fer bilurin omanav vegnum. Bilurin er eftir øllum at døma farin runt, tí takið er kroyst niður. Bilurin gjørdist vrak av óhappinum.

Til alla lukku sat førarin í trygdarbelti, og tí slapp hann so væl frá hendingini, verður sagt av politistøðini í Runavík. Vakthavandi kennir tó ikki orsøkina til óhappið.

Førarin varð fluttur á Landssjúkrahúsið í sjúkrabili til kanningar.

## Harðskapsmál á Varmakeldu

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Eysturoynni hevði bara eitt mál um harðskap at taka sær av á Varmakeldustevnuni, sum var í Fuglafirði um vikuskiftið.

Hendingin fór fram við ítróttarhøllina á Kambsdali sunnumorgunin klokkan fimm, har nógv fólk varð savnað til Varmakeldudans. Ein ungur maður loypur brádliga uppá motorhjálmin á bili, ið koyrir framvið. Maðurin fer av aftur hjálminum og sparkar síðurútin á førarasíðuni inn. Førarin sker seg í andliti av rútinum.

Løgreglan sigur, at harðskapurin ikki hevði nakra serliga orsøk ella endamál. Maðurin er ikki tikin enn, men løgreglan veit, hvør hann er. Tískil er tað bara ein spurningur um tíð, áðrenn tey fáa hendur á honum. Hann verður væntandi ákærdur fyri harðskap.

Annars verður sagt frá eini sera friðarligari stevnu. Tað er merkisvert, at eingin er tikin fyri at koyra við kenning. Ein verður ákærdur fyri brot á politiviðtøkurnar, tá hann tveitti eina fløsku upp í loft, sum lendi á einum bili. Hetta var eisini á Kambsdali.

Stevna var eisini í Hvalba, men haðani er einki at frætta, og alt gekk friðarliga fyri seg.